Felagið Trolbátar

Til Fiskimálaráðið

Vestmanna 25 Juli. 2026

Viðmerkingar til lógaruppskot um "serstakar fiskidagar til bólk5b fyri fiskiárið 2026".

Felagi trolbátar hevur móttikið uppskot til løgtingslóg um serstakar fiskidagar til bólk 5b í 2026. Hoyringsfreistin er sera stutt og tískil er tað trupult at viðgerða uppskoti út í æsir, herundir gagnligar og minni gagnligar avleiðingar. Felagið Trolbátar væntar at vera innkallað í vinnunevndina tá viðgerðin av uppskotinum kemur fyri har. Felagið umboðandi smærru trolbátanar í bólki 4T hevur tó fylgjandi viðmerkingar til uppskoti:

Liminir í felagnum trolbátar eru Fiskaklettur, Sigatindur, Búgvin, Jens Leon, Olga Maria, og Skálafossur. Hóast uppskoti ikki gagnar bólki 4T á nakran hátt, er tað jaligt at landstýrismaðurin ynskir broytingar/øking ímun verandi dagatal í skipanin.

Í 2018 avgjørdi løgtingi at leggja viðgerðina av áseting av fiskidøgum úr løgtinginum út í Fiskimálaráðið. Hetta bleiv gjørt fyri at sleppa undan tí rumbli sum ofta stóðst av viðgerðini í løgtinginum. Treytin fyri at leggja ásetingina av fiskidøgum út í Fiskimálaráðið, var at ein umsitingarætlan skuldi gerast sum skipaði reguleringina av døgum eftir okkara høvðusfiskasløgum toski, hýsu og upsa. Eftir at Felagið trolbátar, Havstovan, Reiðarafelagið, Fiskimálaráðið, MFÚ, Vørn og manningarfeløgini samdust um eina veiðireglu í 2019, fór umsitingarætlanin at virka frá 1 jan 2020. Tíverri gingu tað bert 3 ár, so breyt Havstovan/Fiskimálaráðið avtaluna og harvið var umsitingarætlanin frá 2019 ikki galdandi longur og er ongantíð rætta aftur. Stabilitetsreglan staðfestur at eitt nú bátanir í bólki 4T á ongan hátt skuldu kunna veri skornir meir enn 30% yvir 6 ár (max 5% um ári). Men nú 6 ár eru liðin, kunna vit staðfesta at bátanir í bólkinum eru skorin 50%.

Hóast rumbli sum plagdi at standast av viðgerðini í løgtinginum, er tað gott at viðgerðin, við hesum uppskoti, partvís kemur aftur í løgtingi. Á tann hátt gerast løgtingslimir varhugir við støðuna í umsitingarætlanini, og fáa møguleikan at rætta skeivleikan sum er komin í ásetingina av fiskidøgum í skipanini. Vit mæla til at løgtingi viðgerð allar bólkanar av nýggjum, og ikki bert bólk 5b. Best hevði veri um løgtingi staðfesti við lóg, at Fiskimálaráðið skal halda seg til tað semju sum bleiv undirskriva í 2019. Harvið hevði løgtingi tryggja arbeiði/sjónarmiðini hjá øllum limunum í arbeiðsbólkinum, og á tann hátt hevði umsitingarætlanin veri betri kjølfest sum grundarlag undir allari fiskidagaskipanini. Um tað var galdandi, hevði friður valda í skipanini og dagar framvegis tøkir í øllum skipabólkum.

Vegna Felagið Trolbátar

Bjarni í Skálum, form.